**Semja millum Maskinmeistarafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið**

**1.** Sáttmálin verður endurnýggjaður fyri tíðarskeiðið frá 1. oktober 2013 til 1. oktober 2015.

**2.** Tann 1. oktober í 2013 hækkar mánaðarlønin við 0,71%.

**3.** Tann 1. oktober í 2014 hækkar mánaðarlønin við 1,4%.

**4.** Tann 1. oktober í 2013 verða persónar, ið hava maskinistprógv ella føroyska maskinmeistaraprógvið løntir í 8. lønarflokki (áður 6. lønarflokkur).

**5.** Tann 1. oktober í 2013 verður í § 6 sett inn nýtt stk. 5, ið er soljóðandi "Fyri arbeiði í kvøld- og náttarvakt eigur maskinmeistari frí 1 tíma fyri hvørjar 37 tímar, arbeitt verður".

**6.** Tann 1. oktober í 2014 hækkar tímatalið í § 6, stk. 5 úr 1 tíma upp í 2 tímar.

**7.** Partarnir hava gjørt avtalu um fráboðanarfreist, ið er 72 tímar, roknað frá midnátt; sí hjáløgdu avtalu.

**8.** Frá 1. oktober 2013 er sáttmálin eisini galdandi fyri maskinistar/maskinmeistarar í starvi hjá IRF. Samstundis verða greinarnar í sáttmálanum tillagaðar innlimanini av IRF.

Flokking verður sett inn í sáttmálan § 2, stk. 3: "Rakstrarleiðarin fyri Brennistøðina og Spilloljuverkið hjá IRF í 15. lønarflokki."

**9.** Verða partarnir samdir um tað, kunna ávísar umflokkingar verða gjørdar í sáttmálaskeiðinum.

**10.** Lønartalvan er longd úr 51 upp í 69 lønarstig.

Teir maskinmeistarar, sum í dag fáa eina ikki eftirlønargevandi viðbót, kunnu varðveita hesa. Teir kunnu sjálvir avgera, um teir skulu innplaserast av nýggjum, uttan viðbót. Nýggj innplasering skal verða útreiðsluneutral.

Sama prinsipp verður brúkt, tá nýggj fólk verða sett í starv, sum higartil hevur verið flokkað við viðbót.

**11.** Nýggj grein 21 verður soljóðandi:

*Stk. 1* Er sáttmálin uppsagdur, og partarnir ikki komnir ásamt, ella annar parturin ber seg undan samráðingum, binda partarnir seg til at fáa samráðingar framdar við uppílegging av semingsstovninum.

*Stk. 2* Ivaspurningar um at tulka sáttmálan verða at leggja fyri Fasta Gerðarrætt.

**12.** Nýggj grein 22 verður soljóðandi:

Deildarleiðarin á Framleiðsludeildini og verkmeistarar í starvi hjá SEV, hava ikki rætt at leggja arbeiðið niður í samband við møguligar arbeiðsósemjur, verkfall o.l.

**13.** Fyrrverandi grein 22 verður til grein 23.

**14.** Lønartalvan og sáttmálin eru dagførd samsvarandi omanfyristandandi.

*Í Tórshavn tann 17. desember 2013*

**Maskinmeistarafelagið** **Kommunala Arbeiðsgevarafelagið**

**Avtala um fráboðanarform og fráboðanarfreist**
**millum**
**Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Maskinmeistarafelagið**
**fyri maskinmeistarar í starvi hjá Elfelagnum SEV og hjá IRF**

Í løgtingslóg nr. 39 frá 13. mai 2013 um semingsstovn, er ásett í § 7, "Partarnir hava skyldu at áseta sínamillum reglur í áhugatrætum, herundir í minsta lagi fráboðanarform og fráboðanarfreist undan arbeiðssteðgi." Tí verður gjørd henda avtala:

Partarnir viðurkenna rættin hjá hvørjum øðrum at lýsa og seta í verk arbeiðssteðg eftir ásetingunum niðanfyri.
Stk. 2. Fráboðan um arbeiðssteðg, eisini samhugaarbeiðssteðg, skal vera skrivlig og latin mótpartinum minst 72 tímar undan arbeiðssteðginum. Roknað verður frá á midnátt.
Stk. 3. Fráboðanin skal greitt siga frá, hvønn arbeiðssteðg, talan er um, og hvussu víðfevndur arbeiðssteðgurin er.
Stk. 4. Arbeiðssteðgur kann ikki verða fráboðaður, meðan sáttmálin er í gildi. Er sáttmálin farin úr gildi, kann arbeiðssteðgur ikki verða fráboðaður, fyrr enn samráðingar um nýggjan sáttmála eru endaðar. Er semingsstovnurin komin uppí, ella er semingsstovnurin boðsendur, eru samráðingarnar at meta sum endaðar, tá ið semingsstovnurin er givin við semingsroyndini, og hevur boðað frá tí.
Stk. 5. Hendan avtalan kann sigast upp saman við uppsøgnini av sáttmálanum partanna millum, við somu freist og fráboðan. Tó kann hendan avtalan bara ógildast við nýggjari avtalu.
Stk. 6. Hendan avtalan fær gildi frá 1. januar í 2014.

*Í Tórshavn tann xx november 2013*

**Maskinmeistarafelagið**

**Kommunala Arbeiðsgevarafelagið**